

*Tað vóru nakrir rimmar kalvar, sum fingust í Grønlandi um hesa tíðina*

við. Nógvir av monnunum høvdu sera gott handalag.

## Komu í Føroyinghavnina

Loksins komu vit inn í Føroyingahavnina, sum í 1927 var flutt til sítt táverandi pláss. Her var gott akkerspláss. Tað var ikki fyrr enn seinni, at tað kom havn og aðrir hentleikar í Føroyingahavnini.

Áðrenn vit komu inn, kastaðu vit snørini, so vit kundu fáa fisk til døgurða. Hetta koma sera væl við at fáa feskt undir tonnina.

Á vegnum inn komu vit fram á Haabet úr Havn, sum var ein tveymastrað skonnart uttan motor. Vit høvdu tá fingið motor og tóku teir uppá sleip.

Móti kvøldi løgdu vit til akkers nærindis húsunum hjá Møller kolonistýrara. Hann syrgdi fyri, at vit kundu senda fjarrit heim um, at vit vóru væl framkomnir.

Vit skuldu nú rigga skipið til fiskiskap, men fingu kortini tíð at síggja okkum um í økinum, har tað var nógv av síggja. Her vóru nógvar smáoyggjar. Skipini kannaðu sær hvør sína oyggj at goyma sína útgerð, sum so kundi taka umborð aftur eftir tørvi.

## Vitjan av kajakkum

Vit fingu síðan vitjan av einum heilum flota av kajakkrógvarum. Teir hildu seg burtur at byrja við, men teir vóru veitraðir at koma nærri. Vit hugdu forvitnir eftir teimum, eins teir munnu hava hugt eins forvitnir at okkum. Hetta vóru tvey heilt ymisk fólkasløg, har smílið var fyrsta sambandið.

Men tað var skjótt, at Møller kom við sínum maskinbáti og rak kajakkirnar burtur. Men áðrenn hetta hendi, fingu tær høvi til at vísa okkum nøkur av teirra kynstur so sum at kasta við harpun, at skjóta við byrsu og at koppa runt við kajakkini. Afturfyri fingu teir keks og tubakk.

Vit skiltu ikki, at nakar kundu hava fortreð av hesum, og vit vóru argir inn á Møller. Hetta var danski politikkurin tá í tíðini at "verja" grønlendingar móti útlendskari ávirkan.

Seinni sníktu báðir partar seg tó til at hava samband tíðliga á morgni, meðan Møller svav!

## Út á Fylla Banka at rógva við bátum

Vit fóru so úr Føroyinghavninini út á Fylla Banka, har Justines hevði fingið nógvan fisk í 1927. Tað vóru bert fáir tímar at sigla. Á leiðini sigldu vit framvið 30-40 trý- og fýramastraðum portugisiskum skonnartum, sum lógu fyri akker. Tær veiddu við smáum bátum við einum manni umborð. Bátatnir vóru kallaðir doryir. Hvør skonnart hevði 50-70 doryir. Tað tyktist ógvusligt, tá móðurskipini sendu allar hesar doryir frá borði. Tær tóku nógv pláss á Fyllabanka.

Vit undraðu okkum yvir, hvar teir goymdu hesar doryir. Men tær vóru settar upp í hvørja aðra og fyltu tí ikki so nógv.

## Nú var samveiða og ikki sjálvdráttur

Tað var tað nýggja, at tá skip veiddu undir Grønlandi, var tað ikki sjálvdráttur hjá nógvum av skipunum. Tá var býtt javnt millum manningina. Hetta var væl undirtikið av manningini, og nú fekk eg so møguleika fyri at vera líkamaður við allar hinar umborð. Hetta kom eisini at merkja eitt munandi betri samstarv millum menninar.

Vit skuldu nevniliga rógva út við róðrarbátum heldur enn at standa við lúnniningа. Men arbeiðsdagurin var framvegis langur. Vit gingu vakt á tann hátt, at vit arbeiddu 12 tímar skiftisvís á bátunum við fiskarí og á skipinum við reinsan av fiskinum. Síðan var frívakt í seks tímar. Harvið gjørdist arbeiðsdagurin munandi meira fjølbroyttur. Men hetta gav tó sjáldan meira enn 5 tímar svøvn, og serliga teir eldru menninir høvdu ringt við at sovna eftir eina so harða vakt.

Hetta lív at rógva út við bátum var nógv meira fjøllbroytt enn tað, vit vóru vanir við.

Vit byrjaðu ein mánamorgun at fiska. Vit høvdu tveir bátar. Tað kundu verið fimm mans við, men hjá okkum vóru bert tríggir mans við hvørjum báti. Vit nýttu lættari reiðskap enn vanligt umborð á sluppunum. Í staðin fyri 7 punds lodd brúktu vit 5 pund, og sjálvt snørið var eisini klænri og lættari.

Hetta riggaði sera væl, ikki mist tí dýpið var ikki meira enn 40-50 favnar. Tað var ein hópur av fiski at fáa á Fylla Banka. Heldur enn at reka av miðinum, sum vildi merkt, at vit mistu kennið, var ein maður, sum andøvdi, og tveir sum drógu, so kennið var tí út í eitt, til báturin var fullur.

Tað, at arbeiðið var fjølbroytt, merkti, at menn komu ikki at líða av pínu, sum ofta var galdandi, tá standast skuldi við snøri í heilar dagar. Menn vóru so mikið betri fyri, at sjálvt eldri menn kundu fara í og úr bátunum upp á dekkið uttan trupulleikar. Tað gekk eisini nógv betri at tørna út.

Bátarnir fóru frá borði í senn, og skiparin gav boð um, at bátarnir skuldu liggja tætt saman. Hann føldi seg ótryggan, um hann misti bátarnar úr eygsjón.

Á hendan hátt vóru eingir serarbeiðarar. Við at skifta dugdu allir alt frá avhøvding til fiskurin lá saltaður í lastini. Hetta var so mikið fjølbroytt, at dagurin ikki føldist langur og keðiligur. Men ein 108 tímars arbeiðsvika var tó eisini treytað av sunnudagshvíldini.

Vit vóru úti við bátunum fýra samanhangandi vikur uttan tap av tíð ella veiðu, tó kundi veðrið vera eitt sindur óforútsigiligt.

Fyrstu vikuna í juli var nógv regn av norði, og tað var nú strævið at skula arbeiða út í eitt í oljuklæðum. Tey gjørdu tað eisini tungt at koma í og úr bátunum. Tað vóru eisini dagar, tá vit hveptu okkum at fara frá borði, men so sjógóðir sum bátarnir vóru, skuldi nógv til, áðrenn vit settust aftur.

## Veitsla í Føroyingahavnini

Tá fjórða vikan var farin, og saltið var brúkt, fóru vit við fullum skipi inn í Føroyingahavnina. Longu sunnumorgunin ankraðu vit við "okkara" oyggj, har vit høvdu lagt útgerðina upp. Saltdamparin var komin náttina til sunnudag og hevði bert brúkt 10 dagar úr Havnini í Føroyingahavnina.

Skipini á Dana banka høvdu frætt um skipið og vóru øll komin inn, og skjótt vóru 50 skip inni í havnini. Við damparanum var eisini postur, og fekk hvørt skip sín postsekk. Í pakkunum var alt gott, og tað mest vanliga var heimabakað kaka og smákøkur. So tá mennnir vitjaðu hvønn annan umborð á skipunum, var eisini kaka á borðinum. Hetta var sum ein veitsla, sum var ein gleðilig uppliving hjá øllum. Tey gomlu bløðini vórðu lisin við áhuga, soleiðis eisini tey politisku tíðindini.

## Minniligt útimøti

Kvøldið endaði við einum útimøti á eini lyngklæddari oyggj, og her vóru ikki færri enn 7-800 mans til staðar. Møtið var fyriskipað av missiónskum skiparum, sum vóru við í bróðurkreðsinum á havinum.

Møtið hetta kvøldið 15. juli vardi í 2 tímar, sum var vanligt fyri missiónsmøtir. Her vóru talur og vitnusburðar frá monnum, sum komu ymsa staðni frá í Føroyum, eins og tað var dúgliga sungið.

Eg skal nevna okkurt frá hesum útimøti, sum helst hevur verið tað fyrsta fyri føroyskar fiskimenn í einum fremmandum landi. Vit undraðust yvir, hvussu kvirt tað var, ikki so frægt sum eitt fuglaljóð, og tí hoyrdust talararnir so sera væl. Tað vóru tó stórur mýggjabitar, sum royndu at órógva. Men flestu føroyingar eru so hepnir, at grønlendski mýggjabitin ikki brýggjar seg um teirra blóðtypu. Møtið endaði við, at sungnir vóru tveir sangir: "Takk, o Gud fyri hetta møti" og "Gud við tykkum til næstu ferð", sum teir flestu kendu.



*Vesthavet var undir Grønlandi í 1925. Danskur blaðmaður var við, og hann tók hesa mynd av dekkinum. Dekkið á Silver Lining man hava verið líknandi*